## Statoilstøðin - øðrvísi marknaðarføring

23. november var ein søguligur dagur fyri føroyska marknaðarføring. Tá var sendingin Statoilstøðin í luftini á fyrsta sinni. Sansir hava ment hetta konseptið. Hetta er fyrstu ferð, at ein 100% kommersiell sending verður send í føroyskum útvarpi. Statoilstøðin er ein beinleiðis útvarpssending, sum lýsir lívið á teymum ymisku Statoilstøðunum kring landið. Endamálið er at nýta útvarpsmiðilin til at marknaðarføra Statoil á ein nýggjan hátt. Statoilstøðin er ein hugnalig, fólkslig sending, sum verður send tríggjar ferðir um vikuna á Rás2 kl. 17.15 til kl. 18.15. Verturin ferðast til tær ymisku støðirnar, og gevur lurtaranum eina mynd av, hvussu lokala lívið er á støðini. Umframt prát og serlig tilboð til tey vitjandi eru góðir vinningar til summar hepnar kundar. kelda: www.sansir.fo




# Kirkjutænari misnýtti meg í áravís

**Klokkarin við krykkunum var ein maður við nógvum valdi. Hann hevði virðing millum manna, men í loyndum misbrúkti hann ein drong í níggju ár. Drongurin er í dag 41 og fortelur sína søgu fyri at stuðla arbeiðnum fyri at stegða kynsligari misnýtslu í Føroyum**

ÁGANGUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Ein 12 ára gamal drongur stendur á keiendanum í Leirvík. Tað er hávetur og rættiligt ódnarveður. Einsamallur í myrkrinum umhugsar kaldi og váti drongurin, hvussu hann skal taka lívið av sær. Hann ætlar sær at leypa á sjógv, men hann vil ikki hava tað at síggja út sum sjálvmorð, tí tað hevði verið synd fyri mammuna. Kanska um hann svam yvir móti hinari keini, so fóru fólk at halda, at hann bara í býttleika var farin ein svimjitúr.

- Hvar hevur tú verið, tú ert so vátur og kaldur, spurdi mamman, tá hann eina góða løtu seinni smoygdi sær innum. Hann tordi ikki at leypa, og svimjitúrurin var av ongum. Hann hevði bara verið keitúr, segði hann við mammu sína.

Drongurin var tann nú 41 ára gamli Arnbjørn. Hann livdi í einum loyniligum ræðuleika, har hann regluliga varð misnýttur av háttvirda klokkaranum í bygdini.

- Fyrstu ferð tað hendi, var eg bara níggju ára gamal. Eg egndi og var einsamallur í skúrinum, tí tað var um nátturðatíð, og eg vildi gera meg lidnan, áðrenn eg fór heim. Tá kemur klokkarin stillisliga inn, greiðir Arnbjørn álvarsliga frá.

Nakrar minuttir seinni var 9 ára gamli drongurin eina uppliving ríkari, sum førdi hann inn í eitt lív merkt av ótta, ræðslu og kúgan. Hann var kynsliga misnýttur av klokkaranum, og hesin ágangur helt á líka til hann fekk koyrikort.

### Hann hevði altíð hug

Tá klokkaran fór haltandi á krykkum út úr egningarskúrinum, segði hann við drongin, at hetta var teirra loynidómur, og hetta mátti hann ikki fortelja fyri nøkrum.

- Og sjálvandi tordi eg ikki annað enn at akta hann. Eg var bara eitt barn, og hann var ein vaksin maður, sigur Arnbjørn. Hann minnist nógvar óhugnaligar hendingar, men tær sum standa klárast í minninum, eru løturnar, tá hann var líka við at verða uppdagaður.

- Misnýtslan var óhugnalig og ræðulig. Hann brúkti meg, og tá eg bleiv størri, gjørdist tað enn meira vemmiligt, tí eg fekk nakað burtur úr eisini. Alt mítt lív handlaði um at flýggja, men tað var ikki lætt, tá man búði í einari lítlari bygd. Hann fann meg altíð, og hann hevði altíð hug á mær, sigur Arnbjørn.

Sum ellivu ára gamal slapp hann við pápa sínum til snellufiskarí undir Íslandi, og hóast tað var hart lív, so var tað ein lætti í mun til heimalívið, tí her kundi klokkaran ikki røkka honum.

- Eg royndi eisini at vera so nógv sum møguligt hjá ommu míni í Kollafirði, tí har fekk eg frið. Kollafjørður var mín frístaður, sigur Arnbjørn, sum er búsitandi í Vági, men kallar seg kollfirðing. Minnini úr Leirvík eru ov ræðandi, til at hann vil kalla seg leirvíking.

Tá hann byrjaði í fimta flokki, vildi hann ikki fara úr Kollafirði og fekk loyvi at ganga í skúla har í nakrar mánaðir.

- Men á jólum vildi mamma hava meg aftur til Leirvíkar, og av tí at eg ikki tordi at siga veruliga grundina, mátti eg gera, sum hon segði.

Hann flutti aftur til Leirvíkar, og misnýtslan helt áfram. Hann royndi at gera seg so lítið eiggiligan sum møguligt. Onkuntíð vaskaði hann sær ikki í vikur, og hann vildi bara ganga í víðum floyalsbuksum. Men líka lítið hjálpti. Maðurin var altíð eftir honum.

### Samfelagið sveik

Einaferð tá Arnbjørn var á veg til útróðrar við pápa sínum, kom klokkarin oman á keina og setti fótin á lúnningina. Hetta var einastu ferð, at drongurin setti seg upp ímóti misnýtaranum. Hann bað mannin pilla av í land.

- Pápi skeldaði meg fyri at banna mannin, tí tað merkti lukku fyri fiskiskapin, at ein gudsóttandi maður sum hann nam við bátin.



*- Fyrstu ferð tað hendi, var eg bara níggju ára gamal. Eg egndi og var einsamallur í skúrinum. Tá kemur klo*
*frá. Nakrar minuttir seinni var 9 ára gamli drongurin eina uppliving ríkari, sum førdi hann inn í eitt lív me*

Eg bannaði ikki vanligt, men í staðin fyri at undrast yvir, hví eg bannaðist, so skeldaði hann meg bara.

Tað var púra óhugsandi fyri drongin at fortelja nøkrum um mannin. Hann kendi tað, sum tað var hansara egna skuld, og eingin tosaði um slíkt. Og maðurin var sum Gud, hann hevði alt vald.

Í dag hevur Arnbjørn uppdagað, at nógv hildu klokkaran við krykkunum vera ónærisligan, men eingin gjørdi nakað við tað.

- Øll vistu, hvussu hann var, men eingin tordi at seta orð á tað. Soleiðis var hann bara, tóktist hugburðurin at vera, sigur hann hugsunarsamur.

Sjálvur tordi han einki at siga. Hann fjaldi tað, sum stóð tað um lív. Hann minnist einaferð, at omman í Leirvík hevði sæð blóð í undirbuksum í vaskikurvini og spurdi hann, hvat tað var.

- Eg segði bara, at eg hevði eksem, sigur Arnbjørn. Og so varð ikki meira tosað um tað.

Arnbjørn heldur, at hevði B36 havt sítt átak ímóti kynsligari misnýtslu fyri 35 árum síðani, so hevði hann vita, at hann ikki skuldi finna seg í tí.

- Men eg visti einki, sigur Arnbjørn. Hann fegnast um nýggja átákið hjá B36, tí tað er tøgnin, sum heldur børnum føstum í misnýtsluni.